## Kyksilvur kann steðga hvalaveiði

Mánadagin kunnu norskir hvalabátar fara undir at veiða ta árligu hvalakvotuna, men sama dag skulu heilsumyndugleikarnir taka støðu til, um tað yvirhøvur er heilsuliga ráðiligt at eta hvalatvøst.

Norsku vísindafólkini hava longu staðfest, at so nógv eitrandi evni eru í spiki, at tað er ikki egnað til mannaføði. Janneche Utne Skåre, professari sigur, at fólk eiga ikki at eta meiri enn tíggju gram av spiki um vikuna, og børn og kvinnur, sum eru við barn, eiga als ikki at eta spik, sigur hon.

Tað eru eitrandi evni sum PCB, sum gera, at vísindafólkini mæla fólki frá at eta spik. Í tvøstinum er tað harafturímóti kyksilvur, sum er tann stóri vandin. Í fjør tóku heilsumyndugleikarnir royndir av hvalatvøsti, og tað er úrslitið av hesum kanningum, sum nú skal leggjast fyri myndugleikarnar.

## Leita í Evropa

Amerikanarar hava illgruna um, at fleiri av fyrrverandi leiðarunum í Irak eru flýddir til Vesturevropa.

Amerikanska blaðið Washington Times skrivaði fyrr í vikuni, at fleiri av teimum iraksku leiðarunum gøvdu fingið franskt pass frá fronsku sendistovuni í Sýrialandi. Passið gevur fólki innferðarloyvi til ES-londini. Fronsku myndugleikarnir hava avsannað, at teir hava latið irakum pass, men kortini er CIA farið undir at leita í Vesturevropa. Keldur í Washington siga, at CIA hevur illgruna um, at nakrir av teimum týdningarmestu leiðarunum í Irak eru flýddir hendanvegin.

Amerikanararnir siga, at teir vilja hava fatur á 55 fyrrverandi irakskum politikarum og embætisfólkum, men enn hava teir bara funnið 19 teirra.

## Skráseta skip í Mongolia

Mongolia hevur onga strond og tískil heldur onga havn. Ikki ein einasti metur av landsins 8.000 kilometra langa marki liggur við sjógvin, og lægsta staðið í landinum er eisini 518 metrar yvir havinum.

Kortini er Mongolia í ferð við at gerast ein sjóferðslutjóð. Myndugleikarnir eru komnir eftir, at tað ber til at útvega ríkiskassanum útlendskt gjaldoyra við at lata útlendsk reiðarí skráseta síni skip har og at lata skipini sigla undir mongolskum flaggi.

Hetta hevur eisini víst seg at hava áhuga, tí sambært myndugleikunum eru umleið 20 útlendsk skip á veg undir mongolskt flagg. Higartil eru tað yvirhøvur russisk skip, sum fara undir tað mongolska flaggið, men myndugleikarnir ætla sær eisini at fáa fatur á øðrum skipum, og teir hava tí latið upp eina serliga skrásetingarskrivstovu í Singapore.

## Møtir týðandi monnum

Norski forsætisráðharrin, Kjell Magne Bondevik, fær nakrar strævnar dagar seinni í mánaðinum.

Í døgunum frá 15. til 19. mai skal hann hitta bretska forsætisráðharran, Tony Blair, amerikanska forsetan, George W. Bush, og franska forsætisráðharran, Jean-Pierre Raffarin. Umframt Bush skal hann eisini tosa við amerikanska varaforsetan, Dick Cheney.

Forsætismálaráðið í Oslo sigur, at Bondevik fer at tosa við teir fýra um sambandið millum USA og Evropa eftir kríggið í Irak, og endurbyggingararbeiðið í Irak er eisini eitt av málunum á dagsskránni. Royndirnar at fáa ferð á friðartilgongdina millum ísraelsmenn og palestinar verða eisini umrøddar á fundunum.

# Amerikanskir hermenn fáa ikki skjól í Danmark

**32 lond hava higartil játtað at geva amerikanskum borgarum skjól, verða teir skuldsettir fyri krígsbrotsverk. Danmark sigur nei.**

KRÍGSBROTSVERK
*Árni Joensen*

USA hevur hermenn í fleiri londum, og amerikanska stjórnin ber ótta fyri, at lond, sum eru fíggindaliga sinnað ímóti USA, fara at nýta nýggja krígsbrotsmannadómstólin í Haag sum eitt politiskt amboð við at flýggja honum amerikanskar hermenn til rættarsókn. Tí hevur stjórnin í Washington roynt at fáa lond at vátta, at tey fara at verja hermenninar, og higartil hava 32 lond gjørt tílíkar sátttmálar við amerikansku stjórnina.

Noreg fekk herfyri eina slíka áheitan úr USA, men vísti henni aftur, og nú ger Danmark tað sama. Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, er boðin til Washington, tí George W. Bush, forseti ætlar at takka donsku stjórnini fyri stuðulin til kríggið í Irak. Men samstundis ætlar hann at tosa við forsætisráðharran um krígsbrotsmannadómstólin.

Men danska støðan er greið. Per Stig Møller, uttanríkisráðharri, sigur, at Danmark styðjar arbeiðið hjá dómstólinum, og at danska stjórnin virkar fyri, at øll lond gera tað sama.

Amerikanska stjórnin hevur boðað frá, at USA fer ikki at senda hermenn til friðarvarðveitandi uppgávur uttan so, at hermenninir fáa trygd fyri, at teir verða ikki flýggjaðir dómstólinum til rættarsókn. Síðsta summar eydnaðist tað USA at fáa eina slíka trygd, men tann avtalan fer úr gildi í summar, og tey flestu evropeisku londini hava boðað frá, at tey fara ikki at endurnýggja avtaluna.

Fyrrverandi amerikanski forsetin, Bill Clinton, góðkendi krígsbrotsmannadómstólin, men Bush setti góðkenningina úr gildi, tá hann tók við.

# Kreppa á norska landgrunninum



*Virksemið á norska landgrunninum er minkað so nógv, at talið á teimum, sum arbeiða á pallunum, er minkað eina helvt*

**Leitingarvirksemið á norska landgrunninum er minkað nógv seinastu árini, hóast oljuprísurin er góður.**

OLJUVINNA
*Árni Joensen*

Virksemið á norska landgrunninum er nú so lítið, at tosað verður um beinleiðis kreppu. Víst verður á, at í 2000 vóru 24 pallar virknir á landgrunninum, nú eru teir bara 11 í tali og næsta ár ætlandi bara seks.

Stjórin í stóra frálandavinnufelagnum Smedvig, Kjell E. Jacobsen, sigur tað vera søguligt, at virksemið er so lítið, samstundis sum oljuprísurin er so góður.

Hetta hevur eisini havt stóra ávirkan. Fyri trimum árum síðani arbeiddu 6.300 fólk á norsku pallunum, men í dag er talið bara 3.100. Kjell E. Jacobsen sigur, at norski oljuídnaðurin stendur seg ikki í kappingini við teir útlendsku kappingarneytarnar, tí rakstrarútreiðslurnar eru ov stórar. Hann nevnir millum annað, at á norsku pallunum arbeiða fólk tvær vikur og hava síðani frí í fýra vikur. Men her er lítil vón um nakra broyting, tí fakfeløgini hjá teimum, sum arbeiða á pallunum, hava gjørt greitt, at tey fara ikki at góðtaka nakað, sum ger arbeiðsviðurskiftini hjá limunum verri.

Hóast oljuprísurin hevur verið góður, vórðu fáar nýggjar olju- og gassleiðir funnar í 2001 og í fjør, men oljufeløgini eru nú til reiðar at váða meiri í royndunum at finna nýggjar leiðir. Men fyritreytin er, at tey hava so mikið meiri eftir av vinninginum, og tí heldur stjórin í Norsk Hydro, Tore Torvund, at tað almenna eigur at lækka skattin hjá feløgunum, finna tey nýggjar leiðir.



# TONY BLAIR 50



*Á landsfundinum hjá Labour í fjør hitti formaðurin í føroyska javnaðarflokkinum, Jóannes Eidesgaard, bretska starvsfelagan*

**Týsdagin fylti bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, 50. Ofta verður sagt, at menn tá koma í kreppu, men soleiðis er ikki við Blair. Tvørturímóti er tann eyðmjúki almenni tænarin vorðin ein sterkur heimsleiðari.**

BLAIR FIMTI
*Árni Joensen*

- Eg eri til reiðar at møta mínum skapara og at standa til svars fyri tey, sum hava latið lív orsakað av mínum avgerðum.

Soleiðis tosar maðurin, sum gjørdi av at koyra Bretland í kríggj við Irak. Frammanundan hevði hann hugsað seg væl og virðiliga um, men avgerðina tók hann, tí hann hevði eina næstan halga sannføring um, at hann gjørdi tað, sum rætt var. Hann tók avgerðina, sjálvt um tann minni parturin av veljarunum vóru líka sannførd um, at tað var skeivt at fara í kríggj saman við USA uttan góðkenning frá ST, og sjálvt um meiri enn ein millión fólk savnaðust í gøtunum í London at mótmæla krígsætlan hansara.

Tony Blair er broyttur nógv, síðani hann sum 41 ára gamal varð valdur til formann í bretska arbeiðaraflokkinum Labour. Tey sjáldsama longu eygnahárini og tað sakleysa andlitið høvdu givið honum eyknevnið Bambi. Men tað var, áðrenn innanhýsis uppreistur í parlamentinum, yvirgangshóttanir og gølugreinar í bløðunum høvdu hert hann. Í dag er hárvøksturin tynri, posarnir undir eygunum størri, og Tony Blair líkist einum manni, sum hevur sæð ov nógv, og sum hevur tikið ov nógvar torførar politiskar avgerðir. Hann hvørki roykir ella drekkur. Hansara einasti veikleiki er sambært honum sjálvum sjokuláta og milkshake.

### Gekk nýggjar leiðir

Tað sá einki út hjá Labour, tá tann 30 ára gamli Tony Blair varð valdur í parlamentið í 1983. Margareth Thatcher sat enn við valdið og hevði Bretland í síni hulu og jarnhørðu hond, og valskráin hjá arbeiðaraflokkinum var avoldað og hóskaði ikki til dagsins veljarar. Stevnumið sum tjóðartøka og at beina fyri kjarnorkuvápnunum var ikki júst tað, sum hevði áhuga veljaranna. Men tá tann gamli floksleiðarin John Smith doyði, fekk Tony Blair høvi at venda skútuni. Hann lat sær ikki lynda bert at venda skútuni, men umskipaði hana so nógv, at teir gomlu trúgvu Labour-veljararnir høvdu ilt við at kenna flokkin aftur. Í 1994 eydnaðist Blair at gerast leiðari og forsætisráðharraevni eftir einari avtalu við Gordon Brown, fíggjarmálaráðharra, sum umboðar tann vanliga siðbundna Labour-politikkin.

Tað fyrsta, nýggi floksformaðurin gjørdi, var at umskipa bygnaðin í flokkinum. Hann setti serligar ráðgevar, sum skipaðu fyri veljarafundum um ávís evni, og allar veljarakanningar vórðu kannaðar væl og virðiliga. Viðurskiftini millum Labour og bretska vinnulívið høvdu ongantíð verið góð, men eisini tað broytti Blair.

Populisma var ikki longur eitt ókvæmisorð, men heldur tað, sum skuldi fáa Labour aftur til valdið. Teir floksfelagarnir, sum funnust at broytingunum, fingu greitt at vita, at alternativið var ein konservativ stjórn, og tað gjørdi, at tey atfinningarsomu tagdu. Tiltakið gjørdist ein sonn sólskinssøga í 1997, tá konservativa stjórnin hjá John Major var fyri einum so eyðmýkjandi ósigri, at flokkurin hevur ikki reist seg aftur enn.

Longu tá Tony Blair flutti inn í forsætisráðharrabústaðin í Downing Street 10, fór hann undir tað næsta málið, sum var at tryggja, at Labour skuldi eisini vinna næsta val. Hetta hevði ikki verið vanligt hjá undanfarnum arbeiðarastjórnum, men Blair vísti enn einaferð, at tann gamla tíðin var farin, og at ein nýggj hevði tikið við. Ráðgevar hansara fingu úr at gera, og veljarakanningarnar komu í hásætið. Stórar upphæddir vórðu játtaðar almennu tænastunum, og Blair nýtti hvørt einasta høvi til at greiða fólki frá, at Labour var fólksins flokkur. Ja, tað vóru teir politisku eygleiðararnir, sum høvdu hug at kalla hann ein Bill Clinton, sum tosaði enskt.

### Stóð við sítt

Men úrslitið kom í 2001, tá hann varð afturvaldur við stórum meiriluta.

Men hann fekk ikki frið at njóta sigurin leingi og at samsýna veljarunum. Hendingarnar í New York og Washington tann 11. september broyttu ístaðin lív hansara. Blair var ein av teimum fyrstu stjórnarleiðarunum, sum skiltu, at yvirgangshóttanin var heimsumfatandi, og at tilburðirnir í USA høvdu gjørt, at heimurin var ikki tann sami longur. Hann var eisini tann fyrsti, sum tók undir við altjóða stríði ímóti yvirgangi, og sambandið millum Bretland og USA gjørdist tættari enn nakrantíð. Tað vóru nú ikki øll, sum vóru líka fegin um tað, og tá hann valdi at styðja George W. Bush í krígnum í Afghanistan, vóru tað summi, sum skýrdu hann ein lýdnan hund. Men hann stóð við sítt.

Á landsfundinum hjá Labour í fjør fekk hann tær fyrstu veruligu ávaringarnar frá sínum egnu, men við einari megnarrøðu eydnaðist tað honum í síðstu løtu at forða einari samtykt um at fordøma eitt møguligt kríggj við Irak. Samstundis fekk hann eisini annað at hugsa um. Bløðini skrivaðu um konu hansara, sum hevði keypt eina íbúð í Bristol, har hon hevði nýtt ein svikara sum millummann. Í fleiri vikur válkaðu bløðini sær í málinum, men Blair fekk vent almenna tosinum við at venda aftur til eitt møguligt kríggj við Irak.

Tá Evropa og USA ikki kundu semjast um Irakmálið, royndi Blair seg sum semingsmann millum partarnar, tó uttan stórvegis hepni, og tað hevur kostað honum sambandið við Frakland og kanska eisini Týskland. Men sjálvur var hann ikki eina løtu í iva um, at kríggið var rættvíst. Sjálvt ikki tá helmingurin av hansara egna flokki var ímóti honum, lat hann seg vika.

### Búgvin heimsleiðari

Ístaðin helt hann enn eina megnarrøðu, hesaferð í parlamentinum, har hann meiri ella minni beinleiðis bað sínar floksfelagar velja at taka undir við krígnum ella at koyra seg frá. Alment tosar hann ikki um síni trúarviðurskifti, men tað var tann nærum fullkomna trúgvin, sum var mergurin í røðuni hendan dagin. Tað vóru eisini tey, sum sammettu røðuna við tær, sum Winston Churchill plagdi at halda, tá harðast leikaði á. Hesar dagarnar hugsaði Blair ikki um veljarakanningar, men eftir á pallinum stóð ein heimsleiðari, sum var til reiðar at fylgja sínum hugsjónum, sama hvat tað kostaði.

Síðani sigurin í Irak hava veljarakanningarnar víst, at Blair er vorðin betur umtóktur aftur. Rætt er tað, at kommunuvalið herfyri var ein ósigur fyri Labour, men úrslitið var kortini ikki av leið, tá hugsað verður um, at vit eru miðskeiðis í einum valskeiði.

Á pallinum aftan á Irakkríggið stendur ein maður, sum er vorðin meiri búgvin, og sum hevur fingið størri altjóða dám sum politikari og heimsleiðari.

Ein maður, sum er til reiðar at møta sínum skapara.

*(Kelda: Berlingste Tidende)*